



# FØROYA SYMFONIORKESTUR LÝSIR EFTIR FLEIRI SANGARUM

**Føroya symfoniorkestur framførir minst tvær ferðir um árið verk saman við kóri.**

Kórið er m.a. fastur táttur í árligu nýggjárskonsertini, og mál okkara er eisini at hava eitt stórt kórverk um árið í septembermánaði.

Komandi heyst er ætlanin at syngja Requiem eftir Brahms. Nótarnir eru komnir og verða útflýggjaðir í vár saman við eini fløgu við røddunum. Tá fara vit væntandi eisini at hava eina venjing saman.

Annars er ætlanin, at sangararnir sjálvir skulu venja eftir útflýggjaðu fløguni, og tí verður ikki neyðugt við so mongum felagsvenjingum áðrenn konsertina. At konsertin er løgd í septembermánaði kemst av, at vit vilja ikki órógva vanligu vetrarvenjingina hjá øðrum kórum.

Hevur tú royndir sum kórsangari og vilt syngja við Føroya symfoniorkestri, kanst tú møta til sangroynd leygardagin 8. desember í Musikkskúlanum á Frúutrøð millum kl. 12.00 og 14.00. Til royndina syngur tú ein sang, ið tú velur eftir egnum ynski.

Boð verða givin við teldubrævi, um tú ert upptikin ella ikki.

FØROYA SYMFONIORKESTUR

FØROYA SYMFONIORKESTUR · POSTRÚM 1170 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL. 21 11 12 · WWW.FSO.FO · FSO@FSO.FO

REPROZ

# Jólapostur 2007

Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsinum í Tórshavn í seinasta lagi:

| | Flogpostur | | Skipspostur | |
|---|---|---|---|---|
| | Brøv | Pakkar | Brøv | Pakkar |
| Bretland | 14. des. | 13. des. | 06. des. | 06. des. |
| Danmark | 18. des. | 17. des. | 13. des. | 13. des. |
| Finnland | 15. des. | 14. des. | 06. des. | 06. des. |
| Grønland, Nuuk | 15. des. | 14. des. | 15. nov. | 15. nov. |
| Ísland | 18. des. | 18. des. | senda ikki við skipi | |
| Noreg | 18. des. | 12. des. | 06. des. | 06. des. |
| Svøríki | 17. des. | 10. des. | 06. des. | 06. des. |

Omanfyri nevndu freistir eru at síggja á www.postur.fo

Upplýsingar um seinastu freistir at senda jólapost til onnur lond og neyvari freistir um jólapost til býir og bygdir í Grønlandi eru at fáa á størstu posthúsunum

## Innlendis

Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi: mikudagin 19. desember

## Tollavgreiðsla

Tað er sera umráðandi fyri skjóta tollgreiðslu í móttakaralondunum, at vøruinnihaldið (gávurnar) í sendingum verður skrivliga útgreinað á tollsegn

## Matvøra

Avmarkingar eru, tá matvøra skal sendast til útheimin. Upplýsingar eru at fáa á posthúsinum, um hvat og hvussu nógv kann sendast í hvørjari sending

**Veðrið kann darva postflutningin. Sendið tí postin í góðari tíð.**

*Postverk Føroya ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár*

Postverk Føroya



FØROYABANKI

www.sosialurin.fo

# Fyrilestur í miðlahúsinum

**Komst tú ikki inn á pedagogútbúgvingina? tú kanst enn náa tað!**

Jens Maibom Pedersen, cand. theol og fyristøðumaður á Diakonháskúlanum, heldur eitt upplegg um útbúgvingarnar á háskúlanum saman við Beintu Joensen, sum hevur tikið útbúgving á skúlanum.



Jens Maibom Petersen

**Mánadagin 3. desember kl. 19.30**

Vit borðreiða við kaffi og smákøkum.

***Øll eru vælkomin***




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni